STUDNI
Student Grant Fund

## STUÐULSMØGULEIKAR

Studningur til hægri og styttri  vinnuførleikagevandi útbúgvingar ............................... 6.139 kr. pr. mðr. í 12 mðr.

Lægri studningur á miðnámi ..................................................................... 2.248 kr. pr. mðr. Í 11 mðr.

Hægri studningur á miðnámi ..................................................................... 4.668 kr. pr. mðr. í 11 mðr.

Lán til hægri og styttri vinnu- førleikagevandi útbúgvingar ....................................... 2.960 kr. pr. mðr. í 12 mðr.

Lán á miðnámi ......................................................................................... 2.960 kr. pr. mðr. í 11/12 mðr.

Endalán ................................................................................................... 9.099 kr. pr. mðr. Í 11 mðr.

Bókastudningur til lesandi undir 18 ....................................................................... 4.455 kr. fyrst í skúlaárinum

Vistarhaldsstudningur ............................................................................... 3.112 kr. pr. mðr. Í 11 mðr.

Barnastudningur ...................................................................................... 1.222 kr. pr. mðr. Í 11/12 mðr.

Studningur til einsamallar uppihaldarar ....................................................... 1.825 kr. pr. mðr. Í 12 mðr.

Barnsburðarfarloyvisstudningur, miðnám/hægri lestur ........................................... 4.668/6.139 kr. í 11 mðr.

Verkætlanarstudningur, sí upphæddir til ferðastudning

ÚSUN skúlagjald ...................................................................................... upp til 100.000 kr. Um árið

ÚSUN lán til skúlagjald .............................................................................. upp til 100.000 kr. Um árið

Málsligt fyrireikingarskeið .......................................................................... sí heimasíðu

## FERÐASTUDNINGUR

Danmark ................................................................................................. 1.500 kr.

Evropa ................................................................................................... 3.100 kr.

Aðrastaðni .............................................................................................. 4.100 kr.

Ferðastudningur til børn hjá lesandi ........................................................... sí heimasíðu

Søk lestrarstuðul og lestrarlán umvegis **Vangan**. Við hesum verður studningurin skjótari á konto.

Dagført 14.08.2026

STUDNI
Student Grant Fund

## KUNNING OG TREYTIR

Lesandi á hægri útbúgvingum og á styttri vinnuførleikagevandi útbúgvingum fáa stuðul í 12 mánaðir. 12. mánaðurin fevnir eisini um lestrarlán.

Endalán er til lesandi, ið hava fingið tann stuðul, ið fáast kann. Treytin fyri at fáa endalán er, at tú tekur eina hægri útbúgving, ert lestrarvirkin, og at avvarðandi útbúgvingarstovnur kann vátta, at tú ert før/ur fyri at gera útbúgvingina lidna innan 1 ár.

Lesandi á miðnámi fáa stuðul í 11 mánaðir. Einsamallir uppihaldarar á miðnámi fáa stuðul í 12 mánaðir. 12. mánaðurin fevnir eisini um lestrarlán hjá einsamøllum uppihaldarum.

Lesandi, ið fáa serliga barnaískoytið frá Almannaverkinum, fáa harafturat studning sum einsamallir uppihaldarar í 12 mánaðir.

Lesandi á miðnámi, ið eru uppihaldarar, t.v.s. antin eru gift, eiga børn ella hús, fáa hægra miðnámsskúlastudningin.

Lesandi á miðnámi, ið eru 18 ár og eldri, og búgva til leigu við ávísum treytum, fáa hægra miðnámsskúlastudningin.

Øll onnur, 18 ár og eldri, fáa lægra miðnámsskúlastudningin. Studningurin fæst mánaðin eftir at tann lesandi verður 18 ár.

Tey, ið eiga børn, fáa harafturat barnastudningsupphæddina fyri hvørt heimabúgvandi barnið, sum er undir 18 ár.

Øll lesandi, ið eru 18 ár og eldri, hava møguleika at taka lán.

Tey, ið eru undir 18 ár, fáa bókastudningin fyrst í skúlaárinum.

Vistarhaldsstudningurin verður latin teimum, ið eru undir 18 ár og noyðast at flyta til útbúgvingarstaðið.

Barnsburðarfarloyvisstudningurin verður veittur í sambandi við barnsburð og ættleiðing. Studningurin er tann sami, sum tann lesandi vanliga fær. Bæði foreldrini kunnu ikki samstundis fáa barnsburðarfarloyvisstudningin.

Ferðastudningur innanoyggja. Ókeypis ferðaseðil við bussi aftur og fram í skúla hvønn dag. Søk Strandfaraskip Landsins.

Verkætlanarstudningur er ein ferðastudningur til verkætlanir til lesandi á hægri útbúgvingarstovnum í Føroyum og uttanlands í sambandi við størri verkætlanir, ið skulu gerast í øðrum landi enn í lestrarlandinum.

Skúlagjald kann verða goldið til hægri útbúgvingar uttan fyri Norðurlond, tó í mesta lagi kr. 100.000 um árið. Um skúlagjaldið er hægri, kann tann lesandi lána upp til kr. 100.000 um árið frá Studna. Í ávísum førum er møguligt at veita henda stuðul í Norðurlondum.

Málsligt fyrireikingarskeið er ein skipan, ið veitir stuðul til málslig fyrireikingarskeið til hægri útbúgvingar í ikki enskt-talandi londum, og er ætlað teimum, ið hava ætlanir um at lesa hægri lestur í hesum londum.

Ferðastudningur er til lesandi, ið leita sær til onnur lond í útbúgvingarørindum. Studningurin verður veittur lesandi, og børnum teirra, eina ferð um árið

Sí nærri kunning um freistir v.m. á heimasíðuni www.studni.fo

Søk lestrarstuðul og lestrarlán umvegis **Vangan**. Við hesum verður studningurin skjótari á konto.